# TILTØK

**Gudstænastur skírisdag**
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11.00, altargongd
Argja kirkja: Bergur D. Joensen kl. 11.00, altargongd
Havnar kirkja: Sonja Klein og Bjarni Bæk kl. 11.00, altargongd, skriftamál kl. 10.40
Havnar kirkja: Jóannis Fonsdal kl. 18.00, altargongd
Kaldbak: Bjarni Bæk kl. 18.00, altargongd
Christianskirkjan: Hans Eiler Hammer kl. 11.00, altarg.
Sambýlið í Bøgøtu: Hans Eiler Hammer kl. 19.30
Viðareiði: Elsa Funding kl. 12.00, altargongd
Hvannasund: Elsa Funding kl. 17.00, altargongd
Kunoy: Niels Pauli Danielsen kl. 12.00
Kunoy: Sangløta fyri børn í kirkjuni kl. 19.00, Hanus Simonsen
Skála: Jógvan Fríðriksson kl. 11.00, altargongd (talvan gongur fyri Guds boðan)
Sjóvar kirkja: Jógvan Fríðriksson kl. 17.00, altargongd (talvan gongur fyri Guds orðs boðan)
Rituvík: Meinhard Bjartalíð kl. 11.00, altargongd
Søldarfjørður: Meinhard Bjartalíð kl. 18.00, altargongd
Gøta: Martin R. Jacobsen kl. 12.00, altargongd
Fríðrikskirkjan: Martin R. Jacobsen kl. 17.00
Leirvík kl. 12.00, altargongd, Uni Næs
Elduvík kl. 14.00, altargongd, Uni Næs
Fuglafjørður kl. 18.00, altargongd, Uni Næs
Sandavágur: David Johannesen kl. 12.00, altargongd
Vestmanna kl 11.00, altargongd - Inga Poulsen Dam
Kvívík: Marjun Bæk kl. 12.00, altargongd (skriftarmál kl. 11.50)
Hvalvík: Marjun Bæk kl. 17.00
Tjørnuvík: Mogens Tilsted Christensen kl. 12.00, altargongd
Haldarsvík: Mogens Tilsted Christensen kl. 17.00, altargongd
Funningur: Emil Olsen kl. 12.00, messa
Gjógv: Emil Olsen kl. 17.00, messa
Dalur kl. 12, altargongd: Jákup R. Hansen
Porkeri: Patrick de Neergaard kl. 11.00, skriftarmál & altargongd
Sumba: Patrick de Neergaard kl. 13.00, skriftarmál & altargongd
Vágur: Patrick de Neergaard kl. 18.00, skriftarmál og altargongd
Hvalba: Ólavur Rasmussen kl. 18.00, altargongd
Fámjins kirkja kl. 12, altargongd, Jónsvein Bech.
Tvøroyrar kirkja kl. 18, altargongd, Jónsvein Bech.

**Gudstænastur langafríggjadag**
Vesturkirkjan: Bergur D. Joensen kl. 11.00
Argja kirkja: Heri Joensen kl. 11.00
Havnar kirkja: Sonja Klein kl. 11.00
Kaldbak: Jóannis Fonsdal kl. 12.00
Hvannasund: Elsa Funding kl. 12.00
Viðareiði: Elsa Funding kl. 17.00
Árnafjørður: Hans Eiler Hammer kl. 11.00
Haraldsund: Hans Eiler Hammer kl. 12.15
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen kl. 11.00
Kollafjørður: Marjun Bæk kl. 11.00, altargongd
Hósvík: Mogens Tilsted Christensen kl. 12.00, altargongd
Norðskáli: Emil Olsen kl. 11
Eiði: Emil Olsen kl. 12.15
Funningur: Bjarni Bæk kl. 12.00
Selatrað: Jógvan Fríðriksson kl. 18.00
Glyvrar: Meinhard Bjartalíð kl. 11.00 (verður útvarpað)
Fríðrikskirkjan kl. 11.00: Martin R. Jacobsen kl. 11.00
Miðvágur: David Johannesen kl. 12.00, altargongd
Sørvágur kl. 12.00, altargongd - Inga Poulsen Dam
Funningsfjørður kl. 12.00, altargongd, Uni Næs
Skopun kl. 12: Jákup R. Hansen
Húsavík kl. 18: Jákup R. Hansen
Hov: Patrick de Neergaard kl. 11.00, skriftarmál og altargongd
Leiti: Patrick de Neergaard kl. 13.00, skriftarmál og altargongd
Bønhúsið í Øravík kl. 12, altargongd, Jónsvein Bech.
Sumba: Ólavur Rasmussen kl. 12.00

**Páskaaftan 26. mars**
Syðradalur: Hans Eiler Hammer í skúlanum kl. 20.00
Glyvrar: Páskaaftansgudstænasta kl. 20.00

**Gudstænastur páskadag**
Vesturkirkjan: Bergur D. Joensen kl. 11.00
Argir: Bjarni Bæk, próstur, kl. 11.00
Havnar kirkja: Hans J. Joensen, biskupur, kl. 11.00
Kaldbak: Sonja Klein kl. 12.00
Hvítanes: Jóannis Fonsdal kl. 11.00
Kirkjubøur: Heri Joensen kl. 12.00
Norðradalur: Bergur D. Joensen kl. 14.00, altargongd
Kollafjørður kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
Eiði: Emil Olsen, kl. 11.40 skriftamál, kl. 12.00 messa (talvan gongur fyri Bláa Kross), kl. 20.00 aftansangur
Gjógv: Emil Olsen kl. 17.00
Funningur: Emil Olsen kl. 18.30
Skála: Jógvan Fríðriksson kl. 11.00, familjugudstænasta (Barnakórið)
Sjóvar kirkja: Jógvan Fríðriksson kl. 12.10, Effata syngur
Oyndarfjørður: Jógvan Fríðriksson kl. 18.00, altargongd
Glyvrar: Meinhard Bjartalíð kl. 11.00 (Barnakórið syngur)
Fríðrikskirkjan: Martin R. Jacobsen kl. 11.00
Æðuvík: Martin R. Jacobsen kl. 17.00
Sandavágur kl. 18.00 - Inga Poulsen Dam
Miðvágur: David Johannesen kl. 12.00
Bøur: David Johannesen kl. 17.00
Sandur kl. 12, altargongd: Jákup R. Hansen
Svínoy: Elsa Funding kl. 12.00
Mikladalur: Hans Eiler Hammer kl. 12.00, konfirmatión. (Talvan gongur í Mikladali fyri Guðs orðs boðan)
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen kl. 11.00, útvarpsgudstænasta. (Talvan gongur í Klaksvík fyri KFUM&K í Klaksvík)
Fuglafjørður kl. 12.00, Uni Næs
Hellurnar kl. 18.00, altargongd, Uni Næs
Vestmanna: Marjun Bæk kl. 11.00
Kollafjørður: Inga Poulsen Dam kl. 11.00
Saksun: Mogens Tilsted Christensen kl. 11.00, altargongd
Langasandur: Mogens Tilsted Christensen kl. 15.00
Vágur: Patrick de Neergaard kl. 11.00
Porkeri: Patrick de Neergaard kl. 12.30
Sumba: Patrick de Neergaard kl. 17.00
Tvøroyrar kirkja kl. 11.00, Jónsvein Bech.
Hvalba: Ólavur Rasmussen kl. 12.30
Sandvík: Ólavur Rasmussen kl. 18.00

**Gudstænastur 2. páskadag**
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11.00
Havnar kirkja: Jóannis Fonsdal kl. 11.00
Nólsoy: Bjarni Bæk kl. 12.00
Hestur: Bergur D. Joensen kl. 12.00
Sørvágur: David Johannesen kl. 12.00.
Miðvágur kl. 12.00, familjugudstænasta - Inga Poulsen Dam
Svínoy: Elsa Funding kl. 12.00, altargongd
Húsar: Hans Eiler Hammer kl. 11.00, altargongd
Mikladalur: Hans Eiler Hammer kl. 13.00, altargongd
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen og Hanus Simonsen kl. 10.00, altargongd
Christianskirkjan: Barnagudstænasta kl. 15.00
Hvalvík: Marjun Bæk kl. 12.00
Norðskáli: Emil Olsen, kl. 11.40 skriftamál, kl. 12.00 messa (talvan gongur fyri sunnudagsskúlan á staðnum)
Kvívík: Mogens Tilsted Christensen kl. 12.00
Sjóvar kirkja: Jógvan Fríðriksson kl. 12.00, Barnakórið
Rituvík: Meinhard Bjartalíð kl. 11.00
Gøta: Martin R. Jacobsen kl. 12.00
Leirvík kl. 12.00, Uni Næs
Skálavík kl. 12, altargongd: Jákup R. Hansen
Bønhúsið í Øravík kl. 11.00, Jónsvein Bech.
Fámjins kirja kl. 12.00, Jónsvein Bech.
Hov: Ólavur Rasmussen kl. 12.00

**Gudstænastur hóskvøldið 31. mars**
Norðoya Vistarheim: Hans Eiler Hammer kl. 19.30
Hov: Patrick de Neergaard kl. 11.00
Leiti: Patrick de Neergaard kl. 12.30

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
*Onki* ungdómsmøti langafríggjadag 25. mars kl. 20.00.
Páskadag 27. mars kl. 18.00: Møti v/ Regin Olsen.

**Ebenezer**
Skírhósdag
kl. 18.00: Evangeliskt møti
Langa fríggjadag
kl. 18.00: Evangeliskt møti
Páskadag
kl. 10.00: Breyðbróting.
kl. 12.00: Sunnudagsskúli
kl. 18.00: Evangeliskt møti
2. páskadag
Evangeliskt møti
kl. 18.00
Øll eru vælkomin
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Katólska kirkjan**
Skírhósdag
kl. 12.00: Páskeretræt v/ Lars Messerschmidt, presti í Mariukirkjuni
kl. 17.00: Seinasta Kvøldmáltíðin
kl. 19.00–24.00: Vøka og tilbiðjan í Kerit
Langa fríggjadag
kl. 11.00: Krossvegur og kl. 15.00: Pínslusøga Harrans. (Talvan gongur til frama fyri Heilaga Landið)
Páskaaftan
kl. 22.00: Páskavøka
Páskadag
kl. 11.00: Hámessa v/ Lars Messerschmidt, presti í Mariukirkjuni.
Eingin sunnudagsskúli verður páskadag.
2. páskadag
kl. 11.00: Hámessa v/ Lars Messerschmidt, presti í Mariukirkjuni

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Skírisdag kl. 18.00: Møti, Palli Petersen talar.
Langa fríggjadag kl. 18.00: Møti, Toril og Niels Edvard Olsen tala.
Páskamorgun kl. 8.00: Páskagleði. Páskatónar við Landssjúkrahúsið kl. 9.00. Møti kl. 11.00 og kl. 18.00, Major Nils Bernhard Topland úr Noregi syngur og talar.
2. páskadag kl. 18.00: Møti, Topland syngur og talar.
Øll eru vælkomin.
www.frelsunarherurin.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin 29. mars kl. 18.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla. Holdini hjá Hera Joensen í Vesturkirkjuni og Kirkjubøar kirkju.
Týsdagin 29. mars kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Mikudagin 30. mars kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla. Holdini hjá Bergi Debes Joensen í Vesturkirkjuni og Argja kirkju.
Mikudagin 30. mars kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið møtir. Ung frá 13 ár og upp eftir eru vælkomin við.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Møti verður 2. páskadag kl. 18.00 við Hera Joensen.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin kl. 10.30 er familjumøti, har Jógvan Z. talar um evnið "Eg eri uppreisnin og lívið". Kl.11.30: Samvera við drekka. Kl.12.00 er tilbiðjanarmøti, har verður ein serstøk tilbiðjanarløta. Barnaansing undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12.00.
www.livdin.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Páskamorgun kl. 11.00: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067
www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið**
Langa fríggjadag kl. 18.00 Møti v. Sverra Steinhólm.
Páskadag kl. 18.00 Møti v. Petur Steingrund, Barbara syngur.
2. páskadag kl. 18.00 Møti v. Regin Olsen.
Týsdagin 29. mars kl. 20.00 Bíbliutími, Rómv. kap. 4, 9-25.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron Vestmanna**
Páskadag verður morgunmøti við breyðbróting klokkan 11.00.
Veri hjartaliga vælkomin.

**Miðvágs Missiónshús**
Møti verður 2. páskadag kl. 18.00.
Hjartaliga vælkomin.

**Zarepta**
Bíbliugransking verður á Zarepta á páskum. Tilmelding á tlf 212662.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Langa fríggjadag kl. 9 til 15 verður føstudagur við fjølbroyttari skrá.
Páskadag kl. 19.00 verður møti.
Ongin sunnudagsskúli á páskum.

**Gøta**
Ungdómsmøti í kirkjukjallaranum leygarkvøldið kl 20.00. Tey ungu skipa fyri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Lívsins Orð**
*Saltangará*
Sunnudagin møti kl. 10.30. Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Skírishósdagur 24. mars: Møti kl.18.00. Frits Thomsen, Skála talar. Glyvra streingakór syngur.
Langa fríggjadagur 25. mars: Møti kl. 18.00. Dánjal Andreassen, Leirvík talar. Beinta Olsen syngur. Innsavnan. Kl. 21.00: Ungdómsløta við sangleiki.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Hann er ikki her, tí at hann er risin upp, sum hann hevur sagt!*

Matt. 28,6

Boðskapurin um Jesu uppreisn er nervin í kristnu trúnni. Uttan uppreisnina, eingin kristin trúgv. Jesu uppreisn merkir, at sigurin er vunnin millum Gud og illamann, millum gott og ónt. Og tað er Gud, sum hevur sigrað. Jesus og sannleikin hava sigrað. Jesu uppreisn er ein søgulig hending. Hann er veruliga upprisin og livir. Uppreisnarboðskapurin byggir á ta tómu grøvina og á opinberingarnar fyri lærusveinunum. Hetta eru tekin, ikki prógv. Vit fáa ikki prógv, men vit fingu ein boðskap. Og trúgv er at siga ja til henda boðskap. Vantrúgv er at siga nei. Fyri kristnu kirkjuna, fyri okkum, er Kristus upprisin og livir. Og hesin boðskapur merkir, at eisini vit skulu liva. Jesu uppreisn merkir, at vit skulu rísa upp og liva. Sig avit ja til uppreisnarboðskapin, liva vit nýtt og meiningsfult lív. Ikki tí at alt gongur við, men tí at vit eiga sannleikan, kærleikan og lívið. Og tað ger munin. Sanniliga er hann upprisin. Og tað merkir, at lívið er sterkari enn deyðin, kærleikin er sterkari enn hatur og Gud sterkari enn illimaður. Dópur okkara merkir, at vit doyðu við Jesusi og at vit risu upp við honum. Vit hava lut í uppreisnartrúnni. Og vit hava lut í lívinum her og nú og um ævir. Ein nýggj tíð er byrjað. Tað er náðinnar tíð. Og vit hava lut í náðini og lívinum. Kristin trúgv er at siga ja til henda veruleika. Og kristin trúgv er altíð uppreisnartrúgv. Trúgv á, at Kristus er upprisin, at vit longu nú eru upprisin og skulu rísa upp og liva. Hetta uppreisnarlív eiga vit við at liva trúðarinnar og kærleikans lív í heiminum. Okkara uppgáva í heiminum er at tæna í kærleika. Vit eiga hetta uppreisnarlív við at geva tað víðari í tænastu. Men um Kristus er upprisin fyri tær og mær er altíð ein trúarspurningur. Men, sum Jesus einaferð segði, sælur er tann, ið ongan meinboga fær av mær. Uppreisnartrúgvin er gáva, ikki nakað, vit kunnu geva hvør øðrum. Hon er Guds og andans gáva. So hjálpi Gud okkum at taka ímóti hesi andans gávu!

Amen

**David Johanensen**